

*Í Haldórsvík luttók Uni Næs, sóknarprestur við minnishaldið*

# Mintust tann sjólátna

**Seinnapartin leygardagin – Alla Halgannadag – var minningarhald við minnisvarðan í Haldórsvík**

MINNINGARDAGUR

*Orð&myndir: Snorri Brend*

**Haldórsvík:** Hetta seinasta árið er ein føroyingur farin á sjónum.

Eins og vanligt hevur verið seinastu 59 árini vóru tiltøk kring alt landið leygardagin, í samband við minningardag teirra sjólátnu.

Eitt av hesum tiltøkunum var við minnisvarðan í Haldórsvík. Byrjað varð við gudstænastu kl. 15 í Haldórsvíkar kirkju, og síðani varð gingið niðan á høvdina, har minnisvarðin stendur.

Eins og vanligt var eisini eitt minnishald á Vinnuháskúlanum henda sama morgunin, har løgmaður Kaj Leo Johannesen helt talu, og klokkan 20 var ein gudstænasta í Dómkirkjuni í Havn í hesum sambandi. Henda var útvarpað kring landið.

Aðrastaðni kring landið vórðu tiltøk avlýst, sum ein partur av samhuganum við tey sum mist hava onkran á sjónum, ella ein á henda hátt vil minnast onkran, ið farin er hetta seinasta árið.

Aftur í ár hevur sjógvurin tikið ein av landsmonnum okkara:

Í ár var tí í minnishaldum, øðrum tiltøkum og í kirkjuni biðið fyri og lýstur friður um 27 ára gamla argjamannin, Kristin Bærentsen, sum druknaði á Sandi tann 14. september í ár.



*Minnisvarðin stendur ovarlaga í bygdini. Men hetta forðaði ikki fólki í at vera við til løtuna, tá kransar vórðu lagdar á staðnum og ein mintist teir farnu úr bygdini*